# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Útbjóðing – bæði og

Í vikuni fingu vit at vita, hvussu mong feløg hava søkt um leitiloyvi í 3. Útbjóðing. Úrslitið var bæði gott og minni gott. Tríggjar umsóknir komu frá fimm feløgum. Í undanfarnu rundunum varð áhugin væl størri. Men tað eru orsøkir til tess. Í fyrstu útbjóðingini í 2000 vórðu 23 umsóknir umboðandi 17 oljufeløg. Fýra ár seinni vórðu 9 umsóknir frá 8 feløgum. Taka vit sjálv tølini yvir umsóknir og feløg, er greitt, at her er stór afturgongd. Men tølini skulu takast við fyrivarni.

At ovurhondsstórur áhugi var til fyrstu útbjóðingina var ein sjálvfylgja. Feløgini høvdu tá brúkt milliónir uppá kanningar og vildu tí náttúrliga eisini vera við, tá útbjóðingin lat upp. Hóast úrslitið av fyrstu brunnunum ikki varð tað man vónaði, so gjørdist 2. runda kortini ein succes, tí nógvar umsóknir komu inn. Hesum kunnu vit helst m.a. takka oljufundunum hinumegin markið fyri, tí fleiri av teigunum, ið vórðu bodnir út komu at liggja úti við markið longur norðuri – sum framhald av fundunum í bretskum øki. Síðani tá eru so tveir brunnar boraðir inni á føroyska basaltinum. Hvørgin var eitt oljufund, tó at vit fingu nógva týðandi vitan, eitt nú um at bora gjøgnum basalt. Turru basaltbrunnarnir vórðu tískil ikki júst nakar appetittvekjari til at fara og bjóða í eini nýggjari rundu. Onnur orsøk til úrslitið av 3. rundu er m.a. tann, at eitt av stóru feløgunum, ENI skal bora ein brunn í 09, og hevur tí nokk um oyruni. Enn eitt stórt oljufelag, Chevron, ið søkti og fekk loyvi í 2. rundu, fer helst at bora næsta ár ella í 2010. So fleiri feløg hava longu ov mikið at gera í verandi loyvum. Haraftrat vita vit, at nógv feløg hava verið og eru rættiliga upptikin av útbjóðingum í bæði bretskum og norskum øki. At stór oljufeløg sum BP og Shell, ið vórðu sera virkin í fyrstu runduni, ikki vórðu við í hvørki 2. ella nú 3. rundu, er stórt spell. Vit kunnu bara vóna, at tey hava valt at sita á síðulinjuni og eygleiða gongdina, og so skjótt eitt fund verður gjørt, at býta á aftur eitt nú við at keypa seg inn í verandi loyvi.

Tað positiva við 3. rundu er, at StatoilHydro er við. Felagið hevur sostatt verið við í øllum rundunum og hugaligt er at hoyra stjóran siga, at Føroyaøkið er ov gott at rýma frá. Nakað, ið øll onnur oljufeløg áttu at skrivað sær aftanfyri oyrað – og koma at sanna!
At felagið hevur tikið føroysku oljufeløgini undir sítt veingjabreiði er eisini góður musikkur, hervið kunnu teir túsundtals føroysku partaeigararnir kenna seg tryggari, tí tað er altíð gott hjá smáum feløgum at vera saman við fíggjarliga og vitanarliga sterkum oljufeløgum. Loysunarorðið ella lykilin til okkara oljuframtíð er sjálvandi eitt fund, og her seta vit álit okkara á fyristøðufeløg sum ENI, Chevron og StatoilHydro. At hesi feløg líkasum hava tikið á seg lokomotivleiklutin frá BP og Shell, ið eru farin í bíðistøðu -vónandi, er gott og eisini náttúrligt, nú tey hava sett Atlantsmótið í sítt skjaldramerki. Her kunnu útbyggingar hinumegin markið vera ein týðandi katalysatorur eisini.

**Sosialurin**

## Fleiri býráðslimir

**SIGRÚN MOHR**



valevni Sjálvstýrisfloksins fyri Havnar kommunu.
www.sjalvstyri.fo

Í Havnar kommunu búgva í dag nærum tjúgu túsund fólk, meginparturin í og uttan um sjálva Havnina. 13 býráðslimir manna býráðið, og av teimum ræður stívliga helvtin, ella sagt við øðrum orðum: 7 býráðslimir í samgongu sita við øllum valdinum. Hetta er ikki serliga demokratiskt.

Um borgarar í kommununi, bæði í og uttan fyri Havnina, skulu vera væl umboðaðir, eigur ein býráðslimur at verða valdur fyri hvørjar túsund íbúgvar. Hetta gevur uml. 19 býráðslimir. Tá verður borgarin væl umboðaður, og smærru økini fáa størri møguleika at fáa ávirkan á førda politikkin. Hetta fer at styrkja nærdemokratiið.

Hetta er eitt av málunum, ið eg fari at virka fyri.

## Til tykkum ungu

**FRANK JACOBSEN**



Tey flestu av okkum hava ein dreym. Kanska ein dreym um at gera okkurt, sum ger mun og hevur týdning. Kanska ein dreym um betri umstøður í nærumhvørvinum.

Eg havi eisini dreymar. Eg síggi ymiskt, sum eg haldi, er gott fyri ung, t.d. ein musikkskúla, sum líkur øll krøv og hevur allar hugsandi hentleikar. Eg síggi allar skúlar í Tórshavnar Kommunu við einum matstaði. Eg síggi eisini ein ungdóm, sum stendur saman og greitt sigur sína hugsan og verður hoyrdur. Ein ungdóm, sum leggur síni ynski fyri myndugleikarnar. Eg síggi, at vit saman kunnu finna tær loysnir, sum gagna ungdóminum best.

Hetta kunnu vit náa um eitt ungdómsráð, sum kann umboða sjónarmið teirra ungu, verður stovnað.

Vilt tú hava ein, sum lurtar eftir tær? Vilt tú hava ein, sum arbeiðir fyri teg? So vel meg! Tú finnur meg á Lista H.

## Rættleiðing til Shell

**BRÚKARA-SAMTAKIÐ**

Í tíðindasending hjá Kringvarpinum á middegi í dag, mikudagin 5. november, vísti formaður Brúkarasamtaksins millum annað á, at prísirnir á diesel og bensini, sum í Føroyum vanliga liggja væl undir danska prísinum, nú liggja ájavnt við og hægri enn donsku prísirnir.

Men í somu tíðindasending vísti Shell á, at hetta var ikki í so. Hesum eru vit í Brúkarasamtakinum ikki samd við, og kenna vit tí okkum noydd til at koma við hesum ískoyti.

Við ársbyrjan í 2007, áðrenn órógvið á oljumarknaðinum rættuliga tók dyk á seg, liggja føroysku bensin- og dieselprísirnir ávikavist umleið kr. 1,60 og kr. 2,30 undir tí danska.

Síðani hendir tað, at prísirnir kring allan heimin fara so fullkomiliga á flog, og halda bara áfram at hækka inntil altjóða fíggjarkreppan kagar undan. Nú fella teir ístaðin, men bara ikki so skjótt her sum aðrastaðni.

Um vit her og nú ynskja at fylla okkum á bilarnar, og leita okkum fram bíligastu sølustøðini, kann hetta gerast í Danmark fyri kr. 8,05 fyri liturin av bensini og kr. 7,68 fyri liturin av diesel. Bíligastu og einastu veitarar í Føroyum eru Statoil og Shell í felag, sum selja hesar somu vørur fyri kr. 8,83 fyri liturin av bensini og kr. 7,68 fyri liturin av diesel.

Hesi tøl vísa heilt greitt, at bensinið í dag er bíligari í Danmark, meðan diesel kostar tað sama.

Samstundis er eisini greitt, at prísirnir hjá Statoil og Shell í Føroyum eru fullkomiliga eins. Tí er trupult at skilja hvørjum kappingarneyta man ynskir at goyma sína prísútrokning fyri. Samstundis er eisini trupult at skilja hvussu hesir prísir kunnu vera úrslit av fullkomnari fríðari kapping. Tí prísirnir á bensini og diesel aðrastaðni eru ikki eins frá veitara til veitara. Dags dato sveiggjar danski bensinprísurin við 14 oyrum, meðan diesel sveiggjar við 19 oyrum. Í Føroyum sveiggjar hann als ikki.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.